## 35,3 mió ov lítið fyri FCN

Talan var um selskapstøming, tá Allan K. Pedersen í heyst keypti partabrøvini í FC Nordsjælland. Allan K. Pedersen keypti felagið frá sínum egna holding-felag, sum var farið í gjaldssteðg, og søluprísurin var hálva millión krónur. Kuratorurin, Pernille Bigaard, staðfestir nú, at veruligi søluprísurin skuldi verið 35,8 mió kr., og tí er krav upp á 35,3 mió kr. reist móti Allan K. Pedersen.



## Calzaghe vil hava Kessler

Joe Calzaghe legði um ársskiftið boksihandskarnar á hillina. Ístaðin vil hann nú arbeiða sum promotor, og hann hevur alment sagt, at hann fegin vil sleppa at umboða danska Mikkel Kessler. – Kessler er heilt greitt besti supermillumvektarin í heiminum. Eg skilji á lagnum, at hann í løtuni er í tvídrátti við sín promotor (Mogens Palle, blðm.), og tá støðan verður minni torgreidd, vil eg fegin sleppa at arbeiða við honum, sigur Calzaghe við heimasíðuna, www.boxingscene.com



*Eyðun Samuelsen setti vegna hondbóltsdómarafelagið veitsluna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Fleiri ferðir sóust limousinur seta spælarar av*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Nakrar av kvinnunum hjá Kyndli á veg til veitsluna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Tey bestu

**Besti málskjútti**
**Kvinnur:** Adina Petrea, Tjaldur *(steyp latið av AP-Busskoyring)*
**Menn:** Agnar Joensen, VÍF *(Café Natúr)*

**Ársins verjuspælari**
**Kvinnur:** Una Olsen, Stjørnan *(Havsbrún)*
**Menn:** Halgir Dahl Olesen, H71 *(Vaðhorn Seafood)*

**Ársins málverji**
**Kvinnur:** Guðrun á Lágabø, Tjaldur *(Prentmiðstøðin)*
**Menn:** Eli Müller, VÍF *(Trygd)*

**Ársins áleypari**
**Kvinnur:** Adina Petrea, Tjaldur *(Rainbow Seafooe)*
**Menn:** Tróndur Kragesteen, Neistin *(Trygd)*

**Ársins venjari**
**Kvinnur:** Egill Steintórsson & Bogi Mortensen, VB *(Vest Pack)*
**Menn:** Morten Hust Pedersen, VÍF *(Elektron)*

**Ársins dómarar**
Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen *(Búsetur)*

**Ársins stjørnuskot**
**Kvinnur:** Fríðrunn Danielsen, StÍF *(Eilif Arge)*
**Menn:** Tummas Pauli Hanusarson *(Tryggingarfelag Føroya)*

**Ársins spælarar**
**Kvinnur:** Adina Petrea, Tjaldur *(Sunset Boulevard)*
**Menn:** Sámal Joensen *(Atlantic Airways)*

**Ársins lið**
**Kvinnur:** *(SMS)*
Guðrun í Lágabø (Tjaldur)
Fríðrunn Danielsen (StÍF)
Durita Christophersen (Stjørnan)
Adina Petrea (Tjaldur)
Una Olsen (Stjørnan)
Simona Petersen (Stjørnan)
Heidi Maria Akselsen (Neistin)

**Menn:** *(Føroya Tele)*
Levi Nybo (H71)
Regin Joensen (H71)
Bárður Johannesen (Kyndil)
Tróndur Kragesteen (Neistin)
Bárður Brimvík (H71)
Sámal Joensen (VÍF)
Niels Andreasen (VÍF)




*Bestu hondbóltsspælararnir í 2008/09. Sámal Joensen úr VÍF og Adina Petrea úr Tjaldri*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ikki spælt í tvey ár

**Adina Petrea var givin sum hondbóltsspælari. Men eftir eitt ár í Føroyum hevur hon lagt fimm heiti afturat sínum CV, og sjálv ætlar hon sær enn meira**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Longu undan gallakvøldinum hevði Adina Petrea vunnið sær heitið sum føroyameistari. Men eftir borðhaldið í Ítróttarhøllini á Hálsi, kundi hon seta fleiri heiti afturat á navnaspjaldrið. Adina Petrea var besti málskjútti hjá kvinnum, kosin sum besti álopsspælari, vald á ársins lið og at enda kosin sum ársins spælari. Eitt hál, sum Adina sjálv hevði ilt við at trúgva, tá hon hevði verið uppi eftir seinasta av steypunum.

- Hetta er bara heilt fantastiskt, og eg hevði als ikki roknað við tí. Kanska er tað bara ov nógv hjá mær her og nú, segði Adina Petrea, tá hon kom av pallinum.

Tú kom til Føroya fyri 8-9 mánaðum síðani. Hevði tú tá nakra hóming av, at tú í kvøld kundi endað kappingarárið soleiðis, sum tú nú hevur gjørt?

- Slettis ikki. Eg var sjálv givin við hondbóltinum fyri tveimum árum síðani, men tá eg so fekk hendan møguleikan, helt eg, at eg skuldi royna. Og í dag kann eg bara siga, at eg eri sera takksom fyri, at eg valdi at taka av.

Og er hetta eisini nakað, sum gevur tær móti upp á eitt nýtt kappingarár við Tjaldri?

- Sjálvandi. Nú fáa vit at síggja, men saman við liðnum fari eg at stríðast fyri, at vit eisini kunnu fáa eins nógv burtur úr kappingarárinum, sum byrjar aftur í heyst, segði Adina Petrea.